**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0744**
**Tíðarskeið 7/6-13/6-2007**

---

**Fólk frá FRS.:** Bogi Hansen og Regin Kristiansen.
Gareth Lee (ein eingilsmaður frá AQUALAB).
William V. Fredericks (ein amerikanari HAVSVÍVARA)
**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum og at seta streymmátara út á teimum føstu støðunum.

**Reiðskapur:** Útgerð at seta fortoyingar út við.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 7/6 kl.1900. Siglt varð norðurum, har vit byrjaðu at sleipa termistorketuna norður úr Ennibergi. Tá vit høvdu sleipað í uml. ein tíma komu vit til nógvar útróðrarbátar, sum royndu við línu, so vit valdu at gevast, fyri ikki at oyðileggja nakran reiðskap. Siglt varð so norður til NWNA, sum varð sett út í øllum góðum. Vit hildu so áfram norðureftir og settu ávikavist NWNE, NWNB og NWNG, allar komu út uttan trupulleikar.
Vit fóru nú inn á Havnina eftir William V. Fredericks, tí Havsvívarinir ikki vóru komnir til Føroyar, tá vit fóru út.
Av Havnini sigldu vit vesturum og sigldu út í Bankarennuna, har vit fyrst settu NWFB og NWFC út, tað gekk sum tað skuldi. Haðani sigldu vit nakað norður í Bankarennuna og tóku ein Havsvívara upp og settu tveir Havsvívara út.
Haðani varð siglt eysturum, men á vegnum tóku vit ein skurð við termistorketuni, vestanfyri Suðuroy. Eftir tað sigldu vit eystur í Hetlandsrennuna, har vit settu NWSC og síðani NWSB út.
Eftir hetta tóku vit ein skurð við termistorketuni inn móti Sandoynni.
Gareth Lee hevði arbeitt allan túrin upp á eitt tól, sum hann skuldi seta út í Bankarennuna, nú hevði hann endiliga fingið hetta tólið at rigga, so vit sigldu nú út í Bankarennuna og settu hetta tólið út.
Haðani sigldu vit norður um Mykines og tóku ein skurð við termistorketuni. Vit tóku so skurðir við Termistorketuni norður úr Mýlingi, norður úr Ennibergi og eystur úr Svínoynni.
Tá hetta var liðugt, varð siglt á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 12/6 kl. xxxx.

**Prøvataking:** Settu 8 standard fortoyingar út. Settu tveir Havsvívara út og tóku ein upp. Settu eitt tól út fyri Aqualab. Tóku 7 skurðir við Termistorketuni.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:**

**Viðmerkingar:**

13-06-2007 ________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0744